# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 24. september 2017 |
| Mál nr.: | 17/00797-1 |
| Málsviðgjørt: | KÁ |

**Løgtingsmál nr. xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um at byggja eitt bú- og umlættingar-heim í Tórshavn til børn og ung við autismu**

## Uppskot til

## Løgtingslóg
## um
## at byggja eitt bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at fara undir at byggja eitt bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu.
*Stk. 2.* Útreiðslan til verkætlanina kann í mesta lagi vera 29 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2025.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið
Lógaruppskotið er ein liður í einari samlaðari løguætlan hjá landsstýrismanninum í almannamálum, ið umframt bú- og viðgerðarstovn til børn og ung við autismu, eisini fevnir um vardar bústaðir, bústovn og barnaheim.

Uppskotið er liður í at bøta um umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek í Suðurstreymi. Verandi bústaðir og bústovnar eru í ringum standi, bíðilistin til búpláss er langur og eingi tøk pláss eru í skipanini til bráðfeingis búpláss.

Verandi standur á fleiri sambýlum til fólk, ið bera brek og bústovnum til børn í Suðurstreymi eru aloftast als ikki hóskandi til endamálið umframt, at húsast verður í gomlum og slitnum sethúsum, ið ikki eru hildin við líka.

Eisini hevur pedagogiska eftirlitið staðfest, at fysisku karmarnir hava beinleiðis ávirkan á, at pedagogiska innihaldið í fleiri førum ikki er nøktandi.

Verandi støða er eisini sera tyngjandi fyri raksturin, tí at vardir bústaðir og bústovnar eru skipaður runt í býnum í heilt smáum eindum.

Eisini mugu bráðfeingis loysnir finnast innanfyri verandi karmar. Avleiðingin er, at samdøgursprísurin pr. búfólk í fleiri førum er alt ov høgur. Við ætlanini um at bøta um umstøðurnar, verður møguligt hjá landsstýriskvinnuni at gagnnýta raksturin skynsamari.

Børn og ung við autismu hava serligan tørv, sum familjurnar í fleiri førum ikki megna at møta.

Fyri at bæði børnini og familjur teirra kunnu hava eitt lív er umráðandi, at tað almenna veitir hóskandi dagtilboð, umlætting og bústovnatilboð.

Tørvur er í dag á einum nýggjum stovni, sum bæði kann rúma búplássi, umlættingarplássi og ymsum stuðulstilboðum í gerandisdegnum,

Í løtuni er bíðilisti og komandi árini fer tørvurin at vaksa, og mett er tí, at neyðugt er at taka hond um hesa avbjóðing.

Málbólkurin heldur í dag til í leigaðum hølum, sum als ikki er tíðarhóskandi til endamálið.

Hendan verkætlanin hevur til endamáls at útvega betri karmar til børn og ung í Føroyum við autismu.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Eingin galdandi lóggáva er um bygging av bústøðunum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at útvega ein bústað og umlættingarheim í Tórshavn við tilknýttum dagtilboði til børn og ung við autismu. Ætlanin skal síggjast í samanhanginum við løguætlanina hjá Almannamálaráðnum, har nýggir bústaðir verða bygdir til fólk, ið bera brek.

Byggingin fevnir um eitt bú- og umlættingarheim í Tórshavn fyri børn og ung við autismu.

Eftir ætlan verður bygt á matr. nr. 1000 í Tórshavn, sum er ogn hjá landinum. Byggingin fevnir um sjálvan bygningin, atkomuna, parkeringsøki og uttanumøki. Ynskið er, at bygt verður á eini hædd. Samlað er talan um 900 m².

Byggingin fevnir um 3 eindir, eina búfólkaeind við 6 búplássum, eina umlættingareind við 6 umlættingarplássum og eitt dagtilboð til áleið 16 borgarar.

Dentur verður lagdur á, at heimið á ongan hátt skal líkjast einum stovni, men heldur einum privatum heimi. Tískil skal bygningurin fella væl inn í umhvørvið.

Av tí, at fólk við autismu eru sera ymisk og hava hvør sín serstakan tørv, verður hædd tikin fyri hesum í byggingini.

Byggingin er nærri lýst í byggiskránni, sum er løgd við sum fylgiskjal.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Lógaruppskotið hevur við sær, at nýggir bústaðarkarmar og umlættingartilboð í Tórshavn til børn og ung við autismu gerast tíðarhóskandi og vælegnaðir til innihaldið á stovninum, eins og tað slepst úr verandi leigumálum til nýggj hølir, sum er bygd til endamálið.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:

Almannaverkinum

MBF

Sosialráðgevarafelagnum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Til hesa verkætlan fyriliggur ein byggiskrá, sum ein bygginevnd hevur latið landsstýriskvinnuni. Kostnaðarmetingin byggir einans á metingar og er tí út frá omanfyrinevnda fyrivarni mettur til áleið 29 mió. kr.

Innan fyri hendan fíggjarkarm verður mett, at til ber at projektara og byggja tveir nýggjar bústaðir. Í kostnaðinum er hædd eisini tikin fyri innbúgvi og uttanumøkinum. Kostnaðurin er framskrivaður til 2022 støðið, tá byggingin sambært løguætlanini fer í gongd.

Útreiðslurnar verða eftir ætlanini fíggjaðar yvir fíggjarárið 2022 við 10,2 mió. kr. og 2023 við tús.18,8 mió. kr.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið førir við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri Suðurstreymoy við tað at staðsetingin verður í Tórshavn.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur við sær, at børn og ung við autismu fáa betri bústaðar – og umlættingar umstøður enn áður.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 19 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini rættin hjá øllum fólkum, ið bera brek, at liva í samfelagnum á jøvnum føti við onnur og við somu valmøguleikum. Limalondini skulu viðurkenna at fólk, ið bera brek, sleppa at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja liva.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk.

Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesar viðurkendu ásetingarnar.

**2.9. Marknaforðingar**
Ongar marknaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp í 29 mió kr. til at byggja bú- og umlættingarheim.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
Greinin heimilar landsstýrismanninum at fara undir at byggja eitt bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu við tilknýttum dagtilboði fyri mesta lagi lagi 29 mió. kr.

**Til § 2**
Greinin er gildiskomuregla og sólseturáseting. Sostatt fer lógin úr gildi 31. desember 2025. Ásetingin tekur støðu í byggiætlanum og tær royndir, sum gjøgnum árini eru gjørdar, og sum vísa á, at seinkingar, ið ikki víðka fíggjarkarmin, kunnu koma fyri.

Almannamálaráðið, 26. september 2017.

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Byggiskrá